# Uttangarðsútskifting
# í
# Mykinesi



# Líðarhagi
matr.nr. 33-172

**Hósdagin 29. sept. 2016 kl. 19.00 varð útskiftingarfundur settur í skúlanum í Mykinesi at viðgera mál um býti av Líðarhaga, matr. nr. 172, Mykines.**

Møtt: 8 eigarar møttu á fundi.

Nevndin var fullmannað, og er hon skipað soleiðis:

**Petur Nielsen**, formaður
**Jógvan F. Nicodemussen**, nevndarlimur
**Eyðfinnur S. Hansen**, nevndarlimur

Nevndarlimirnir vita seg ikki vera so nær skyldar ella svágdar við nakran ognara, at tað nemur teirra gegni. Hetta er váttað á serligum skjali (skjal nr. 1), sum liggur í málinum.

Frá Umhvørvisstovuni møtti Jógvan Frýdal.




Fram varð lagt:

Skjal nr. 2: Lýsingar, ið hava staðið í Sosialinum 13. og 16. sept. og í Dimmalætting 16. sept. 2016, í kunngerðatalvuni í Mykinesi og í Sørvági og á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni og Sørvágs kommunu.

Eingin hevði viðmerkingar til lýsingina ella lýsingarháttin.

Formaðurin lýsti síðani fundin lógliga lýstan og settan.

Skjal nr. 3: Grannastevnuviðtøkan frá 12. sept. 2014 við tilhoyrandi skjølum og staðfest av Búnaðarstovuni 19. des. 2014

Skjal nr. 4: Skriv frá Innlendismálaráðnum, dagfest 5. januar 2015, har **Petur Nielsen** er uppnevndur til útskiftingarformann.

Skjal nr. 5: Útskrift úr rættarbókini, 6. febr. 2015, har **Jógvan F. Nicodemussen**, Sandur, og **Elin Nielsen**, Fámjin, verða uppnevnd til nevndarlimir.

Elini barst frá at møta á fundi, og tí tekur **Eyðfinnur S. Hansen,** Klaksvík, sum uppnevndur varamaður sæti í nevndini.

Víst varð til § 10 í útskiftingarlógini, at útskiftingarkravið kann takast aftur, um øll, sum atkvøddu fyri útskiftingini á grannastevnu, ynskja tað.

Tað varð ikki gjørt.

Formaðurin greiddi síðani frá mannagongdini í sambandi við útskiftingina og bað fundarfólkið greiða frá haganum og skipanini av honum.

**Líðarhagi**, matr. nr. 172, er 12 mk. stórur og o.u. 333 ha. til víddar.

Skipanin er ójøvn, o.u. 400 áseyð, og so ganga 30 seyðir úti í Hólmanum.

Festini eru tvey, annað góðar 5 merkur og hitt knappar 3, so landsjørðin umboðar góðar 2/3 av markatalinum í haganum.

Mykinesmenn leggja virði á haganum í bjørgini og skorarnar, meðan yvirhagin - vallaða lendið frá eggini og niðan á Knúk - í mestan mun er summarhagi. Eitt einstakt fylgi er tó hagfast í erva.

Tey, ið varða av jørðini, halda, at hagin verður best býttur í trý. Ognin fyri seg, og festini bæði í hvør sín einbýttan haga.

Avrátt varð at hittast fríggjamorgunin at tekna upp, hvussu fylgini ganga, og at fara í hagan.

Nevndin avgjørdi, at grundarlag er fyri at býta hagan, og bað eigararnar gera uppskot til býti at senda nevndini. Freistin er sett til 30. oktober, eftir at fjøllini eru gingin.

*Petur Nielsen* *Jógvan Nicodemussen* *Eyðfinnur Hansen*

**Fríggjadagin 30. sept. 2016.**

Vit hittust í skúlanum kl. 9.00, og saman við eigarunum varð roynt at tekna upp, hvar fylgini ganga.

Seinni varð farið um heimara partin av haganum.

**Útskiftingarfundur varð settur á Umhvørvisstovuni tann 11. mai 2019 at viðgera býti av Líðarhaga í Mykinesi.**

Nevndin møtti fullmannað: Jógvan F. Nicodemussen, Eyðfinnur S. Hansen og Petur Nielsen, formaður.

Frá Umhvørvisstovuni møttu Jógvan Frýdal, Óli Johansen og Arnold Thomassen.

Gerðabókin varð lisin.

Nevndin hevur móttikið trý skrivlig ynski, og ein hevur sett fram munnligt ynski.

Ynskini vórðu lisin upp, og nevndin varð kunnað um tað munnliga ynskið. Nevndin hevur tikið ynskini við í viðgerðini.

Festarin *Handan Á* ynskir einbýttan haga. Sama ger festarin í *Útistovu*. Somuleiðis ynskir størsti parturin av ognini einbýttan haga. Eigarin av matr.nr. 3 hevur sett fram munnligt ynski um at fáa *Stúgvar*.

Tað serliga við *Líðarhaga* er, at hagin er langur og mjáur. Summarhagin er á sløttum og snjóstøðurnar eru innanbergs. Síðan 1993 hava bjørgini verið brúksbýtt, meðan *Íralíð*, *Hólmurin* og fylgini *Eilisá*, *Ovaru Eilisá*, *Gásdalur*, *Tindskriðan*, *Líraberg* og *Knúkur* hava verið feli.

Ringt er at býta. Tí hevur nevndin havt fleiri møguleikar á borðinum. Tríggjar hagar - sum ynskt varð. Tveir hagar - ein kongshaga og ein ognarhaga, og so eitt festi saman við ognini og eitt festi í hin lutin. Jú, møguleikarnir eru fleiri.

Áðrenn fyribilsuppskotið endaliga varð sett á kort, varð tosað við teir, sum høvdu sett skrivlig ynski fram, til tess at lýsa hagan. Tosað varð við Eddie Lauritsen, *Handan Á*, Esbern í Eyðanstovu, *Útistovu*, og Jákup í Løðu, sum umboðar ein stóran part av ognarunum.

Nevndin avgjørdi at býta soleiðis:

Hagin verður klovin í tvey – *Handan Á* og *Líðarhagi*.

***Handan Á* - *5 mk 4 gl 18 sk*** verður einbýttur hagi. Tað liggur í kortum, at húsið í *Klingrugarði* skal fella til *Handan Á*. Bøurin til festi *Handan Á* er *Úti á Kumblum*. Húsið *í Klingrugarði* og bøurin *Úti á Kumblum* seta sínar avmarkingar, tá býtast skal.

Víðari verður býtt soleiðis:

*Handan Á* fær part av *Eilisá*, *Ovaru Eilisá*, *Gásdali*, *Heimaranesi*, *Tanga*, *Íralíð* og 14 frælsi í *Hólminum*.

***Líðarhagi* - 6 mk 11 gl 2 sk** fær part av *Eilisá*, *Ovaru Eilisá*, *Líraberg*, *Knúk*, *Ryggirnar*, *á Hálsi*, *Grønaskor*, *Slumpan*, *Stúgvar* og 19 frælsi í *Hólminum*.

Nevndin metir, at hetta býtið liggur tættast at teimum innkomnu ynskjunum, og hagin verður ikki pettaður sundur. Nevndin er tí samd um at leggja skjal nr. 7 - *Uppskot til býti av Líðarhaga* fram á útskiftingarfundinum úti í oynni 12. juni.

*Líðarhagi* átti fýra lutir innangarðs; matr.nr. 59, *Lauritsartrøð*, matr.nr. 109, 167 og 73, *Uppi á Trøð,* og matr.nr. 166, *Uppi á Stígum*.

Nevndin skjýtur upp, at innangarðslutirnir verða býttir soleiðis:

*Handan Á* fær matr.nr. 166, *Uppi á Stígum*.

Líðarhagi fær matr.nr. 59, *Lauritsartrøð*, og traðirnar *Uppi á Trøð,* matr.nr. 109, 167 og 73, sí skjal nr. 8.

*Líðarhagi* hevði nakað av garðskyldu. Talan er um 15 m við rættina við Lauritsartrøð, 62 m við *Eysturportur*, og 142 m *Uppi á Stígum*.

Nevndin metir, at skilabesta býtið er, at garðskyldan við rættina við *Lauritsartrøð* og við *Eysturportur* fellur til *Líðarhaga*, og garðskyldan *Uppi á Stígum* fellur til *Handan Á*, - sí skjal nr. 8.

*Líðarhagi* hevði vetrarbit eystanfyri *Ánna*.

Nevndin er samd um at býta vetrarbitið, so at tað í framtíðini fylgir markinum millum matr.nr. 73 *Uppi á Trøð* og 166 *Uppi á Stígum* og omaneftir *Stovugarði* og í *Ánna* - sí skjal nr. 8. *Handan Á* fær vetrarbit á 7,9 ha og *Líðarhagi* fær vetrarbit á 5,8 ha, sí skjal nr. 8.

Nakað bendir á, at húsið í *Klingrugarði* skal fella til *Handan Á*. Húsið er bygt í 2001, og er gjørt av eigaranum í Líðarhaga. Nevndin hevur ikki tikið støðu til, hvussu býtast skal. Á næsta útskiftingarfundi verður farið á staðið at hyggja at húsinum, og tosað verður við eigararnar um, hvørjir møguleikar eru at býta.

Seks servituttir eru tinglýstir á *Líðarhaga*:

1. 22.04.1980 Rættina, ið stendur við bøgarðin, eiga og brúka *Líðarhagi* og *Heimangjógv* í felag.
2. 22.04.1980 Skjøl um torvskurð vm.
3. 22.04.1980 Skjøl um rætt til at sleppa 1½ kúgv á mørkina í *Líðarhaga* vm.
4. 22.04.1980 Skjøl um veg vm.
5. 22.04.1980 Gøtur og leiðir, sum frá gamlari tíð hava verið nýttar í sambandi við fuglaveiðuna og røkt av haganum, kunnu nýtast sum frammanundan. Fuglaveiðurættindi eru óbroytt, soleiðis sum tey eru lýst í taxasjónini.
6. 07.11.2002 Búi Brattaberg eigur hús á *Innaranesi.*

Eftir býtið verða servituttirnir býttir soleiðis.

*Handan Á*: Servituttur nr. 2, 3, 4, 5 og 6
*Líðarhagi*: Servituttur nr. 1, 2, 3, 4 og 5

Á *Líðarhaga* skal eisini ein nýggjur servituttur lýsast, ið gevur *Handan Á* rætt at røkja og reka upp av *Heimaranesi* og *Innaranesi*. Hvør leiðin, ið rikin verður, verður sett á kort á útskiftingarfundi í Mykinesi. Kortið verður reinteknað og tinglýst.

Tiltøk í haganum, rætt, seyðhús, ból, stik o. a. fella til hagapartin, tey eru í.

Ogn og skuld verða býtt eftir markatalinum millum hagapartarnar.

Endaliga býtið verður framt í klipping í 2019.

Eigararnir hava møguleika at koma við viðmerkingum til

- Skjal nr. 7 - Uppskot til býti av Líðarhaga.
- Skjal nr. 8 - Býti av lutum innangarðs, vetrarbit og garðskylda
- skjal nr. 9 - Eigaralisti

*Petur Nielsen* *Jógvan Nicodemussen* *Eyðfinnur Hansen*

Mikudagin 12. juni kl. 10.20 varð lagt frá landi í Sørvági. Hann var høgur í ættini og kalt. Tummas Henriksen var skipari á ferðini. Tá Jósup kom undir oynna, fekk formaðurin Tummas at greiða frá bjørgunum. Serligur dentur var lagdur á fylgi, og hvussu rikið verður úr bjørgunum, fyrr og nú. Fyri árum síðan var góður hundamaður í oynni, og hann fekk skil at raksturin. Nú kunnu tveir menn við hundum reka bjørgini. Tummas vísti á, hvar hegnað er millum Handan Á og Stúvar, og við Ryggin stendur eisini hegn. Nógv tilfar kemur niður við Ryggin, og tí er ringt at fáa stikið at halda. Komið varð til Mykinesar uml. kl. 11.

**Útskiftingarfundur settur í skúlanum í Mykinesi mikudagin hin 12. juni 2019 kl. 13.00 at leggja fram fyribilsplan til býti av Líðarhaga.**

Fyri nevndina møttu: Eyðfinnur S. Hansen og Petur Nielsen, fm. Vegna forfall kundi Jógvan F. Nicodemussen ikki vera við á fundinum.

Frá Umhvørvisstovuni møttu Jógvan R. Frýdal og Arnold Thomassen. Við á ferðini vóru eisini Rebekka á Rógvu Johnsdóttir og Aron D. Jacobsen, sum eru í starvsvenjing á Matriklinum.

Eddie Lauritsen, Hans Meinhard í Eyðansstovu, Esbern í Eyðansstovu, Tummas Henriksen, Óli Niclassen og Jákup í Løðu møttu á fundi.



Formaðurin beyð vælkomin og legði fram skjal nr. 6, lýsingina, fram, og spurdi um lýsingarhátt. Nevnt varð, at lýst kundi verið betri, men um tað hevði økt um fjøldina av fram møttum fundarfólki var ivasamt. Formaðurin tók tað til eftirtektar og lýsti so fundin lógliga lýstan og settan.

Í stuttum varð gingið ígjøgnum, hvat býtast skal. Kortið, har fylgini vórðu sett á, varð lagt fram, og eisini varð eitt kort, har innangarðs-lutir, ið knýttir eru til hagan, eru á saman við innangarðslutunum hjá Líðarhaga.

So varð lagt til brots. Fyrst og fremst varð lýst, hvar býtast skal. Henda útskifting víkur so nógv frá eini vanligari útskifting, at víkt hevur verið frá vanligum mannagongdum í tveimum førum. Fyri tað fyrsta hevði umboð fyri útskiftingarnevndina tosað við teir, sum høvdu sent inn skrivlig ynski, fyri at lýsa málið nærri. Fyri tað næsta vórðu tey innkomnu ynskini sett á kort og víst fyri fundarfólkinum. Eitt fundarfólk undraðist á, at viðkomandi ikki var tikin við, men formaðurin segði, at prátað er bert við teir, sum hava sent skrivlig ynski inn. Óli vísti á, at vit nevndu Heimaranes og Tangi. Tangi er ein fleygasessur og Innaranes er rætta navnið. Hetta verður rættað.

Síðan varð skjal nr. 7 - fyribilsplanurin, lagdur fram.




| Handan Á - 201 áseyðir | |
|---|---|
| Eilissá | 27 |
| Ovaru Eilissá | 27 |
| Gásdalur | 30 |
| Tindskriða | 20 |
| Heimaranes | 35 |
| Innaranes | 30 |
| Íralíð | 18 |
| Hólmurin | 14 |

| Líðarhagi - 254 áseyðir | |
|---|---|
| Eilissá | 18 |
| Ovaru Eilissá | 18 |
| Líðarberg | 40 |
| Knúkur | 20 |
| Ryggirnir | 18 |
| Á Hálsi | 40 |
| Grønaskor | 28 |
| Slumpan | 28 |
| Stúgvar | 25 |
| Hólmurin | 19 |

| Líðarhagi áðrenn býti | |
|---|---|
| Samlað vídd | 332.6 ha |
| Innanbergs | 139.6 ha |
| Slættin | 192.9 ha |
| - niðanfyri 300 m | 100 ha |
| - omanfyri 300 m | 92.9 ha |

| Handan Á | |
|---|---|
| Samlað vídd | 120.0 ha |
| Innanbergs | 62.5 ha |
| Slættin | 57.5 ha |
| - niðanfyri 300 m | 52.4 ha |
| - omanfyri 300 m | 5.1 ha |

| Líðarhagi | |
|---|---|
| Samlað vídd | 212.5 ha |
| Innanbergs | 77.1 ha |
| Slættin | 135.4 ha |
| - niðanfyri 300 m | 47.6 ha |
| - omanfyri 300 m | 87.8 ha |

Tað sást á øllum brøgdum, at her var seymurin ikki sligin beint á høvdið. Onkur tók seg til høvdið, ein annar bliknaði, ein triðji togaði húgvuna enn longur niður um oyruni. Nú er strikan sett, og nú er nakað at tosa út frá.



Um veljast skal ímillum, eru umboð fyri ognina og Útistovu ikki í iva, hvør parturin er betri. Handan Á fær ein stóran part av suðursíðuni, og vetrarstøðan hjá Eilissá, Ovaru Eilissá, Gásdal og Tindskriðan fellur eftir býtinum til Handan Á.

Steðgað varð á við framløguni, og spurt varð, hvussu hesin ójavnin kann javnast.

Ikki eru nógvir møguleikar. Skal markið flytast á sløttum ella innanbergs? Hvussu við húsinum í Klingrugarði og so Hólminum.



Jákup vísti á, at um Heimaranes og Innaranes verða flutt til Líðarhaga, gerst býtið betri. Handan Á skal ikki reka um Líðarhaga, og onki stik at seta millum partarnar.

Á pappírinum er talan um 65 áseyðir. Tað veruliga talið er nakað minni. Innaranes er sett til 30 áseyð, men tá er tað ikki søluvøra, sum fæst burturúr. Nú er er talið 23.

Tosað varð meira um henda møguleika, men um Heimaranes og Innaranes verða flutt, má javnast onkursvegna. Skal Líðarhagi smalkast á sløttum? Nevnt hevur verið, at slættin lítið virði hevur, serliga tá hann er høgur í ættini. Hetta er valla ein gongd leið.

Nú eru tveir møguleikar eftir - húsið í Klingrugarði og frælsini í Hólminum. Enn hevur nevndin ikki tikið støðu til, hvussu húsið skal býtast, meðan Hólmurin er óbroyttur.

Eddie varð spurdur, hvat hann segði til, at Heimaranes og Innaranes fella til Líðarmenn, og at hann aftur fyri fær húsið. Uppskotið varð ikki blankt avvíst.

Tað sjáldsama er, at onki fylgi er víst at hava vetrarbit á bønum. Nevndin metir, at her hevur Handan Á ein møguleika at fáa nakrar áseyðir afturat.

Líðarmenn hava fingið nakað at hugsa um.

Eftir hetta varð skjal nr. 8 lagt fram. Innangarðslutirnir hjá Líðarhaga, garðskylda og vetrarbit.
Ongar viðmerkingar vóru til tað.

Áðrenn tann formligi parturin varð slitin, varð avrátt at fara út í Klingrugarð at hyggja at húsinum og rættini.

Nú kunnu eigarar og festarar koma við viðmerkingum til skjal nr. 7 – Fyribilsplan skjal nr. 8 – býti av innangarðslutum, garðskyldu og vetrarbiti.

Viðmerkingarnar skulu vera skrivligar og skulu sendast til us@us.fo og vera útskiftingarnevndini í hendi í seinasta lagi 1. august 2019. Viðmerkingarnar verða viðgjørdar í trúnaði av nevndini.

Tá klokkan var farin um nón sleit formaðurin fundin.



Eftir umskipanir á Umhvørvisstovuni er Petur Nielsen loystur frá sum formaður fyri útskiftingina av Líðarhaga. Í skrivi frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum dagf. 1. des 2019, er Arnold Thomassen tilnevndur formaður í útskiftingarnevndini fyri Líðarhaga í Mykinesi. Sí skjal nr. 10.

**Mikudagin 2. desember 2020 kl. 14.00 varð útskiftingarfundur settur á Umhvørvisstovuni at viðgera býti av Líðarhaga í Mykinesi.**

Nevndin møtti fullmannað: Jógvan F. Nicodemussen, Eyðfinnur S. Hansen og Arnold Thomassen, formaður.

Frá Umhvørvisstovuni møtti Jógvan R. Frýdal.

Gerðabókin varð lisin.

Nevndin hevði móttikið nakrar viðmerkingar, og tær vóru lisnar. Viðmerkingarnar vóru tiknar við í viðgerðini.

Á útskiftingarfundinum í Mykinesi varð ivi sáddur um áseyðatalið. Við uttangarðsútskiftingini, sum varð staðfest við dómi í 1978, var áseyðatalið í Líðarhaga sett til 26 á mørkina, t.e. 312 áseyð, íroknað Hólmin og feitilendi. Á fyrsta fundinum varð upplýst, at áseyðatalið var uml. 400 áseyð umframt Hólmin. Eftir tí, ið uppgivið var dagin eftir fundin, er talið uml. 455 áseyðir. T.e. næstan 38 á mørkina.

Av tí, at áseyðatalið er grundarlagið undir útskiftingini, varð tí neyðugt at kanna tølini. Tosað varð við eigararnar fyri at finna út av, hvat áseyðatalið nú er. Menn eru samdir um, at á sløttum eru uml. 200, og í Íralíð eru 18 frælsir. Eilisá 45, Ovaru Eilisá 45, Gásdalur 30, Tindaskriðan 20, Líraberg 40, Knúkur 20 og í Íralíð eru 18 frælsi.

Av Heimaranesi og inn í Stúgvar er talið ov høgt. Um vit taka fylgi fyri fylgi innanbergs, verður upplýst, at áseyðatalið er á leið hetta:

- Heimaranes 28
- Innaranes 22
- Bjørgini (við Ryggin, á Hálsi, Slumbran og Grønaskorð) 80
- Stúgvar 23.

Sostatt er áseyðatalið í Líðarhaga nú uppgivið til uml. 404, íroknað Hólmin og feitilendi t.e. 33 2/3 á mørkina.

Eftir at áseyðatalið er kannað, er lítil ivi í at vestari parturin er heldur betri enn tann eystari.

Av tí at áseyðatalið er ein grundleggjandi býtislykil undir útskiftingini, metir útskiftingarnevndin, at neyðugt er at eyndurskoða fyribilsplanin, sum er lagdurfram. Tað samanhildið við viðmerkingunum, sum eru komnar inn, metir útskiftingarnevndin, at tað er neyðugt at gera ein nýggjan fyribilsplan og leggja hann fram fyri eigarunum.

**Býti av áseyði**

Um býtast skal eftir lutfallinum, skal Handan Á hava 11/24 x 371 t.e. 170 áseyðir av Líðarhaga og 15 frælsi í Hólminum, og Líðarhagi skal hava 13/24 x 371, t.e. 201 áseyðir og 18 frælsi í Hólminum.
Frá Heimaranesi inn í Stúgvar eru 153 áseyðir. Um hetta talið skal nærkast teimum 201, sum Líðarhagi skal hava eftir lutfallinum, er neyðugt at taka tey nærmastu fylgini við. Tey eru Knúkur við 20 áseyðum og Líraberg við 40 áseyðum. Nú er áseyðatalið komið uppá 213., tvs. 12 ov nógv.
Eftir til Handan Á eru fylgini Eilisá, Ovaru Eilisá, Gásdalur, Tindskriðan og tey 18 frælsini í Íralíð. Tað gevur 158 áseyðir.
Nevndin metir, at 12 áseyðir er eitt passaligt mótvirði fyri langfarahaga og nógv liggur innanbergs.

**Garðskylda**

Garðskyldan innangarðs verður óbroytt, tí hvør hagi sær hevur garðskyldu móti sær sjálvum.

**Innangarðslutir hjá Líðarhaga**
Í fyrsta fyribilsuppskoti vórðu innangarðslutirnir býttir soleiðis:

- Matr.nr. 73, 167 og 109 Uppi á Trøð, og matr.nr. 59 Lauritsartrøð, í alt 16.984 m$^2$

fella til Líðarhaga.

Trøðin Uppi á Stígum, matr.nr. 166, sum er 16.765 m$^2$ til víddar, fellur til Handan Á.

Um ein skal býta eftir lutfallinum, so skal Handan Á hava 11/24 av 33.749 m$^2$ t.e. 15.468 m$^2$, og Líðarhagi skal hava 18.281 m$^2$. Tað vil siga, at Handan Á fær 1.516 m$^2$ meiri innangarðs.

Hildið verður tí fast við býtinum frá fyrsta fyribilsplani.

**Vetrarbit**
Norðari Stovugarður varð í uppskoti til at vera markið til vetrarbit. Handan Á hevði 7,9 ha. vetrarbit og Líðarhagi hevði 5,8 ha.
Um roknað verður eftir, eru 13,83 ha. at býta, og er parturin hjá Handan Á 11/24, t.e. 6,34 ha. Parturin hjá Líðarhaga 13/24, og t.e. 7,49 ha.
Fyri at minka um munin á vetrarbitinum verður vetrarbitið flutt frá Stovugarði Norðasti til markið millum matr.nr. 80a og matr.nr. 52a, oman millum matr.nr. 7 og 8a, og í Ánna.
Eftir nýggja býtinum verður vetrarbitið hjá Handan Á 7,55 ha., og hjá Líðarhaga verður tað 6,28 ha.

Við nýggja býtinum fær Handan Á 1.22 ha meiri vetrarbit, enn um býtt skuldi verði eftir lutfallinum. Ringt verður at fáa hetta skeiklað upp á pláss, tí nú markar vetrarbitið móti innangarðsognini hjá festinum Handan Á.

Tí verður vetrarbitið broytt sum omanfyri lýst.

**Seyðahúsið og rættin í Klingrugarði (Úti á Bø)**
Eftir at býta eru seyðahúsið og rættin í Klingrugarði. Í dag er tað felgasogn hjá Líðarhaga.
Metingarmaður hevur mett virðið á húsinum til 160.000,- kr. og á rættini til 10.000,- kr. Mett verður eisini at ein høvuðsumvæling fer at liggja millum 3 - 4.000,- kr. fermeturin. Tað er uml. 270 – 360.000,- kr.
Útskiftingarnevndin hevur fingið eina kostnaðarmeting, um nýtt líknandi hús skal gerast í dag. Mett er, at tað kemur at kosta uml. 1,1 millión at gera líknandi hús í dag. Har aftuat kemur eitt flutningsgjald.

Eftir drúgva umrøðu varð nevndin samd um, at seyðahúsið og rættin skulu fella til Handan Á. Fyri seyðahúsið og rættina í Klingrugarði skal Handan Á stika millum nýggju hagarnar og halda garðskylduna. Handan Á skal bera allar útreiðslurnar til at stika og halda stikið millum nýggju hagapartarnar.

**Broytingarnar frá fyrsta til annan fyribilsplan**

- Áseyðatalið, sum er býtislykilin undir útskiftingini, verður rættað samsvarandi nýggjuupplýsingunum.
- Matr.nr. 96. 3 gyllin verða fluttir úr Líðarhaga til Handan Á
- 2 skinn verða flutt frá Útistovufestinum til festið Handan Á
- Heimaranes og Innaranes verða flutt úr Handan Á til Líðarhaga
- Vetrarbit verður broytt soleiðis, at markið verður flutt av Stovugarði Norðasti til markið millum matr.nr. 52a og 80a, og oman millum matr.nr. 7 og 8a og í Ánna.
- Seyðahúsið og rættin í Klingrugarði fella til Handan Á.
- Handan Á skal stika og halda garðskylduna millum nýggju hagarnar og ber allar útreiðslurnar av hesum arbeiði.

Nevndin er samd um at leggja fram:

- Skjal nr. 11 - annar fyribilsplanur.
- Skjal nr. 12 - Býti av innangarðslutum, garðskyldu og vetrarbiti
- Skjal nr. 13 - Eigaralisti - annar fyribilsplanur

Eigarar og festarar hava møguleika at koma við viðmerkingum til Skjal nr. 11 - annar fyribilsplanur. Skjal nr. 12 - Býti av innangarðslutum, garðskyldu og vetrarbiti og Skjal nr. 13 - Eigaralisti - annar fyribilsplanur.

Viðmerkingarnar skulu vera skrivligar og skulu sendast til us@us.fo og vera útskiftingarnevndini í hendi í seinasta lagi **10. jan. 2021**. Viðmerkingarnar verða viðgjørdar í trúnaði av nevndini.

**Jógvan F. Nicodemussen** **Eyðfinnur S. Hansen** **Arnold Thomassen, fm.**

**Útskiftingarnevndin fyri Líðarhaga møttist týsdagin 4. mai 2021 kl. 14.00 á Umhvørvisstovuni at viðgera tær innkomnu viðmerkingarnar til annað fyribilsuppskot av Líðarhaga í Mykinesi.**

Nevndin møtti fullmannað: Jógvan F. Nicodemussen, Eyðfinnur S. Hansen og Arnold Thomassen, formaður.

Frá Umhvørvisstovuni møtti Jógvan R. Frýdal.

Gerðabókin varð lisin.

Útskiftingarnevndin hevur móttikið fýra viðmerkingar. Tríggjar viðmerkingar snúgva seg um býti av Líðarhaga, og tann eina viðmerkingin snýr seg um Lauritsartrøð.

Útskiftingarnevndin hevur móttikið skriv frá Súsannu og Elini Joensen um ognarviðurskiftini á Lauritsartrøð (Skjal nr. 14). Sambært matrikuldóminum tinglisin 22. apríl 1980 er Líðarhagi komin inn sum eigari av trøðni, sjálvt um tey meina, at rætti eigarin var Laurits Joensen. Fleiri royndir hava verið gjørdar at rætta ognarviðurskiftini uttan úrslit.

Hesin sami spurningur var eisin reistur í samband við innangarðsútskiftingina av Mykinesar bygd. Tá vórðu ognarviðurskiftini rættað soleiðis, at John Joensen’s arv. og Adela Skel Joensen vórðu skrásett sum eigarar av matr.nr. 59. Við góðkenningarskrivi dagf. 18. des. 1994 vórðu matr.nr. 58 og 59 løgd saman. Av tí at ivi var um lógarheimildina fyri hesi broyting, vórðu matr.nr. 58 og 59 aftur býtt sundur við góðkenningarskrivi dagf. 28.05.1996. (Skjal nr. 15)

Av tí at bara tinglýsingin hevur heimild at broyta eigaraviðurskifti, var skjal. nr. 15 lagt fyri tinglýsingina. Tinglýsingin gjørdu av at rætta eigaraviðurskiftini soleiðis, at John Joensen’s arv. og Adela Skel Joensen nú eru skrásett sum eigarar.

Nevndin hevur eisini viðgjørt tær síðstu tríggjar viðmerkingarnar, og nevndin er samd um halda fast við øðrum fyribilsplani við hesum broytingum.

- Lauritsartrøð verður skrásett sum ogn hjá John Joensen’s arv. og Adelu Skel Joensen. Servitutturin “Skjøl um rakstur yvir Lauritsartrøð” verður tinglýstur á matr.nr. 59.

- Útistovufestið letur 2 skinn til Handanáfestið, sambært tilmæli frá útskiftingarnevndini. Umbýti er viðmælt av jarðareigaranum, Búnaðarstovuni.

- Á Túgvu verður markið flutt uml. 20 m inn frá eggini og 80 - 90 m oman eftir. Innanbergs verður markið flutt nakað eystur, soleiðis at tað verður millum Tindskriðumølina og Innaru Tindskriðumøl.

Talan er um smærri broytingar, og er nevndin samd um at leggja endaligan úrskurð fram.

## Úrskurður

**Líðarhagi,** matr.nr. 172 í Mykinesi, verður býttur í tveir partar soleiðis:

| 172a Líðarhagi - 6½ mørk | |
|---|---|
| eigarar | |
| matr.nr. | partur |
| 3 | 00-10-10 |
| 31 | 00-03-07 1/5 |
| 33a | 00-12-18 1/5 |
| 38a | 00-05-06 1/5 |
| 49 | 00-05-06 2/5 |
| 78a | 02-12-10 |
| 93a | 00-14-11 |
| 93c | 00-07-05 |
| 106 | 00-00-06 |

| 172b Handan Á - 5½ mørk | |
|---|---|
| eigarar | |
| matr.nr. | partur |
| 80a | 05-05-00 |
| 96 | 00-03-00 |

Markið millum hagarnar er sum skjal nr. 17 vísur.



Markið innanbergs.

Innangarðslutirnir hjá Líðarhaga vera býttir soleiðis.
Matr.nr. 59 - Lauritsartrøð verður skrásett sum ogn hjá John Joensen's arv. og Adela Skel Joensen.
Servitutturin "Skjøl um rakstur yvir Lauritsartrøð" verður fluttur frá matr.nr. 58 til matr.nr. 59.

Matr.nr. 73, 109 og 167, Uppi á Trøð, fella til matr.nr. 172a - Líðarhagi.
Matr.nr. 166, Uppi á Stígum, fellur til matr. 172b - Handan Á.

Vetrarbitið millum hagarnar verður býtt sum víst á skjali nr. 16.
Garðskyldan verður sum víst á skjali nr. 16.

Seyðahúsið og rættin í Klingrugarði (Úti á Bø) fella til matr.nr. 172b - Handan Á.

Handan Á, matr.nr. 172b, skal stika millum hagarnar, og hevur garðskyldu í 20 ár eftir at stikið er sett uppog góðkent av Líðarhaga.

Handan Á skal halda allar útreiðslur í samband við stiking og garðskyldu í 20 ár eftir at stikið er settupp og góðkent av Líðarhaga. Um ósemja spyrst av hesum, skal garðasýnið avgera málið.

**Servituttir**
Seks servituttir eru tinglýstir á *Líðarhaga*:

1. 22.04.1980 Rættina, ið stendur við bøgarðin, eiga og brúka *Líðarhagi* og *Heimangjógv* í felag.
2. 22.04.1980 Skjøl um torvskurð vm.
3. 22.04.1980 Skjøl um rætt til at sleppa 1½ kúgv á mørkina í *Líðarhaga* vm.
4. 22.04.1980 Skjøl um veg vm.
5. 22.04.1980 Gøtur og leiðir, sum frá gamlari tíð hava verið nýttar í sambandi við fuglaveiðuna og røkt av haganum, kunnu nýtast sum frammanundan. Fuglaveiðurættindi eru óbroytt, soleiðis sum tey eru lýst í taxasjónini.
6. 07.11.2002 Búi Brattaberg eigur hús á *Innaranesi.*

Eftir býtið verða servituttirnir býttir soleiðis.
*Handan Á*: Servituttur nr. 2, 4 og 5
*Líðarhagi*: Servituttur nr. 1, 2, 4, 5 og 6

Sambært servitutti nr. 3 hevur Borgardalur rætt til útrakstur til 15 kýr. Framyvir verður hesin servituttur lýstur, soleiðis at Borgardalur hevur útrakstur til 8 kýr í Líðarhaga matr.nr. 172a, og 7 kýr í Handan Á matr.nr. 172b.

Tiltøk í høgunum, rætt, seyðhús, ból, stik o. a. fella til hagapartin, tey eru í. Brúksbýti frá 1993 fer úr gildi, og seyðurin fellur til hagapartin, teir eru í.

Ogn og skuld verða býtt millum hagapartarnar eftir markatalinum. Ogn og skuld skulu gerast upp fyri 1. nov. 2021.

Álagt verður Umhvørvisstovuni at seta markið millum nýggju hagarnar, har tað er neyðugt.

Umhvørvisstovan ger upp útskiftingarroknskapin, og verður eigaranna partur av kostnaðinum álíknaður nýggju høgunum eftir markatalinum.

Endaliga býtið verður framt í klipping í 2021.

Úrskurðurin verður latin til ákæru.

Kærur skulu vera skrivligar, stílast til Yvirútskiftingarnevndina og sendast Sorinskrivaranum, Postboks 28, 110 Tórshavn. Kærufreistin er 3 mánaðir frá kunngerðardegnum.

Útskiftingin er endað.

**Jógvan F. Nicodemussen** **Eyðfinnur S. Hansen** **Arnold Thomassen, fm.**

**Endaligur útskiftingarfundur varð settur í skúlanum í Mykinesi fríggjadagin 18. juni 2021 kl. 13.00.**



Vegna forfall kundu nevndarlimirnir ikki møta til fundin, og tí umboðaði bara Arnold Thomassen, fm. nevndina.

Frá Umhvørvisstovuni møtti Jógvan R. Frýdal. Við á ferðini vóru eisini Hannis Ritter og Kristian Debes Kúrberg, sum eru í starvsvenjing á Matriklinum.



Á fundinum møttu Jákup Lauritsen, Jónleyg Poulsen, Poul Johannes Andreasen, Eddie Lauritsen, Tummas Henriksen, Óli Niclassen, Jákup í Løðu og Esbern í Eyðansstovu. Eisini vóru Fróði og Kristin frá Tvøroyrar kommunu og lýddu á.

Fyrst bað formaðurin vælkomin og greiddi frá, hví hann einsamallur umboðaði nevndina. Úrskurðurin var gjørdur á seinasta nevndarfundi, og nevdarlimirnir hava fingið skjølini umvegis teldupost, og tosað hevur verið við teir, um teir høvdu nakrar viðmerkingar. Sostatt er talan um eina framløgu, og hildið var at formaðurin var førur fyri at standa fyri tí einamallur.



So var farið í holt við tann formliga partin. Skjal nr. 19 - lýsingin, var løgd fram. Formaðurin spurdi um lýsing og lýsingarhátt og um nakar hevði nakað at viðmerkja til lýsing og lýsingarhátt.

Semja var millum fundarfólkið, at nóg væl var lýst. Formaðurin lýsti so fundin lógliga lýstan og settan.

Spurt hevur verið um útskiftingarkravið kann takast aftur, tá útskiftingin er farin í gongd.

Útskiftingarnevndin hevur kannað spurningin.



Áðrenn støða verður tikin til, um útskiftast skal, hava allir eigarar, sum atkvøddu fyri útskifting, møguleika at taka útskiftingarkravið aftur smb. § 10 stk. 2 í útskiftingarlógini. Atkvøða ikki allir eigararnir fyri at taka útskiftingarkravið aftur, verður útskiftingarmálið latið til útskiftingarnevndina. Nú liggur málið hjá útskiftingarnevndini, og nú vendist ikki aftur. Í Færøsk bygderet bind 2 síða 254-255 “ad. 8 begæring må ikke være tilbagekaldt”, svarar Bjørk eisini spurninginum.

Síðani varð gerðabókin lisin.

Eigararnir sótu sum á nálum, tí nú var bara eftir at lesa úrskurðin upp.



Lauritsartrøð verður skrásett sum ogn hjá John Joensen's arv. og Adelu Skel Joensen. Sí skjal nr. 14 - Viðm. viðv. Lauritsartrøð og skjal nr. 15 - Góðkenningarskriv. Sundurbýti av matr.nr. 58 og 59.

At Lauritsartrøð nú varð skrásett sum ogn hjá John Joensen's arv. og Adelu Skel Joensen fall onkrum fyri bróstið og helt, at tað ikki kundi fara óátalað aftur við borðinum.

So varð skjal nr. 17 - Endaligt býti av Líðarhaga lagt fram, og her vóru ongar viðmerkingar. Somuleiðis var við skjali nr. 18 - Endaligt býti – Eigaralisti.

At enda var skjal nr. 16 - Endaligt býti innangarðs lagt fram.
Her vóru ymiskar meiningar, serliga um seyðahúsið í Klingrugarði (úti á Bø). Nevndin metir, at húsið skuldi falla til Handan Á, móti at Handan Á skal stika millum hagarnar, og hava garðskyldu í 20 ár. Onkur eigari helt, at Handan Á fekk húsið fyri lítið og lætt.

Til seinast varð spurt, um víkjast kundi frá 3 mánaðar freistini. Tá var ein festari skjótur at svara "er býti so gott, at tú vilt stika beinanveg?". Svarað varð, at hvat teir avtalaðu innanhýsis, var teirra søk.

Úrskurðurin verður latin til ákæru.

Kærur skulu vera skrivligar, stílast til Yvirútskiftingarnevndina og sendast Sorinskrivaranum, Postboks 28, 110 Tórshavn.

**Kærufreistin er á Mikkjalsmessu 2021**.

**Útskiftingin er endað**.

Eftir hetta var tosað um leyst og fast, og tá tað nærkaðist nón, sleit formaðurin fundin.

**N.v.**
**Arnold Thomassen, fm.**